## DAGSINS MEINING

# Er tað landsstýrismaðurin sum hevur gruggað?

Tað skerst ikki burt, at summir politikkarar duga ikki hógv. Ein teirra er landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, sum í síðstu viku skuldsetti andstøðuna fyri at grugga eitt mál. Hann kom við hesi skuldsetingini í Sosialinum og Útvarpinum, tí ein meiriluti í Løgtinginum atkvøddi fyri, at lógaruppskotið um tyrlutænastu varð koyrt aftur í Vinnunevndina.Talan er um eitt uppskot, sum heimilar landsstýrismanninum at gera ein 10 ára langan sáttmála við Atlantic Airways um tyrlutænastu. Henda tænastan fevnir um m.a. eftirlit og bjarging og kostnaðurin er settur til 14 milliónir krónur um árið. Tó kann prísurin lækka, um roknskapurin hjá flogfelagnum vísir, at veruligu útreiðslurnar eru lægri enn mett.

At landsstýrismaðurin og Vinnumálastýrið hava samráðingar við føroyska flogfelagið um slíka tænastu er næstan ein sjálvfylgja. Vit hava eitt flogfelag, ið vit øll eiga, og tí hevur Vinnumálastýrið fyrst og fremst samráðingar við hetta felag. Men so kemur spurningurin: – Er tað rætt at lóggeva ein einkarrætt til eitt alment partafelag í heili 10 ár uttan at samráðingar hava verið við onnur feløg fyrst! Tað kann hugsast, at tað eru slík viðurskifti, sum løgtingslimir kanska vilja umhugsa einaferð afturat. Eisini kann hugsast, at tað eru aðrir ógreiðir spurningar í hesum máli, sum ikki eru svaraðir í nevndarviðgerðini. T.d. kostnaðurin. Kann tað hugsast, at Atlantic Airways hevur sett prísin í so lágan fyri at fáa sáttmálan, og at hesin kann fáa negativar avleiðingar fyri flogfelagið, um tyrlutænastan ikki hvílir í sær sjálvum, men drenar flogfelagið fyri pening? Ella er prísurin so høgur, at talan kann verða um óbeinleiðis landskassastuðul til føroyska flogfelagið? Tað ber jú ikki til, tí so er talan um eina kappingaravlagandi støðu. Ein annar spurningur er, hvat siga útrokningarnar um kostnaðin fyri hvønn flúgvitíma? Eru teir á leið teir somu sum í útlondum ella ikki? Sláast kann fast, at álitið hjá Vinnunevndini viðger ikki hesar spurningar.

Harafturat kann tað tykjast løgið, at júst hetta landsstýrið mælir til at gera ein slíkan bindandi sáttmála. Ferð eftir ferð hoyrist, at øll vinna – og nú eisini tænastuveitingar – skulu verða skipaðar eftir fríum marknaðartreytum. Harafturat rógva landsstýrismenn – serliga úr tí liberala Fólkaflokkinum – fram móti at tænastur skulu bjóðast út. Hví skal henda tænastan ikki bjóðast út? Tað er ein fyrimunur fyri okkara politisku skipan, at mál verða gjølliga kannað. Vit skulu ikki hava 80-ini umaftur. Men hetta dømi við Jørgen Niclasen og tylutænastuni minnir ikki sørt um 80-ára politikk.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

# Minningarorð um Bjørg Matras

*1935-2000*

Í hesum døgum fyri einum ári síðan var Bjørg Matras sín síðsta arbeiðsdag á Føroya Skúlabókagrunni. Tað seinasta hálva árið hevði hon borið upp á eina álvarsliga sjúku. Sjúkralegan gjørdist ikki drúgv. Longu 30. januar andaðist hon, 64 ára gomul.

Bjørg varð fødd í Havn 2. oktober 1935, dóttir Sámal Erik Matras av Viðareiði og Marthu, fødd Mørkøre, úr Havn. Bjørg var gift við Hera Jensen úr Havn, sum doyði í 1995. Eins og pápin valdi Bjørg lærarayrki. Hon tók prógv á Føroya Læraraskúla í 1958 og var lærari í Tórshavnar Kommunuskúla frá 1958 til 1991, tá ið hon fór at starvast á Føroya Skúlabókagrunni. Hon var formaður í skúlabókanevndini í trý skeið, frá 1986 til 1998, vald av landsstýrinum eftir tilmæli frá Føroya Lærarafelag.

Í 1973 tók Bjørg útbúgving sum skúlabókavørður á Danmarks Lærerhøjskole. Saman við teimum báðum Jóhannesi Enni, sála, og Ingrið Sondum var hon við til at leggja lunnar undir skúlabókasøvnini í Føroyum. Tey trý fingu í 1995



Barnamentanarvirðislønina frá Skúlabókasavnsfelagnum fyri hetta slóðbrótandi virksemið. Bjørg var við til at stovna Skúlabókasavnsfelagið og var formaður í mong ár. Eisini var hon í nøkur ár skrivari í Norðurlendska Skúlabókavarðafelagnum. Bjørg hevði sæð, hvønn týdning eitt vælvirkandi skúlabókasavn hevði fyri skúlan. Tey seinnu árini av sínari starvstíð í Kommunuskúlanum stóð hon fyri skúlabókasavninum har.

Tað var tí heldur ikki so løgið, at Føroya Lærarafelag mælti til at velja Bjørg í skúlabókanevndina, tí við sínari bakgrund sum skúlabókavørður dugdi hon væl at síggja, hvar ið tørvurin á føroyskum undirvísingartilfari var. Hon visti, hvussu umráðandi tað var fyri samleikan hjá føroyskum børnum, at undirvísingartilfarið var á móðurmálinum.

Stutt áðrenn hon kom á Skúlabókagrunnin, hevði hon saman við øðrum góðum fólkum stovnað forlagið Dropan, hvørs endamál var at geva út bøkur til børn og ung, som vóru kappingarførar við tær útlendsku í dygd og útsjónd. Bjørg týddi sjálv fleiri av bókunum, sum forlagið gav út. Dropin var virkin í nøkur ár og fekk nógv á skaftið.

Bjørg týddi í frítíðini hópin av barnabókum og ungdómsbókum, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út. Fyri sítt týðingarvirksemi fekk hon í 1992 Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs. Eisini beinleiðis undirvísingartilfar var Bjørg við til at skriva. Eitt skifti arbeiddi hon fyri Barnaútvarpið, har hon hevði samrøður við børn um bøkur og tað at lesa.

Tað sæst av verki hennara, at hugurin allar dagar hevur staðið til bókina og bókligt virksemi.

Men størstu orkuna tey seinnu árini av lívi sínum legði Bjørg tó í arbeiðið á Skúlabókagrunninum. Hon var íðin og arbeiðssom og kendi stóra ábyrgd fyri tí starvi, ið henni var litið upp í hendur. Hon var væl lýdd av øllum teimum mongu starvsfelagunum, sum hon gjøgnum sítt arbeiði kom í samband við, og hon var vird fyri sítt starv. Hon var góð og lagalig at samstarva við, hon var positiv, og hon misti ongantíð málið úr eygsjón. Føroysk skúlabókaútgáva átti í henni ein dyggan stuðul. Hennara partur lá ikki eftir.

Sum menniskja og sum starvsfelagi verður hon nógv saknað. Samkensla okkara er við tykkum, ið eftir sita, mammuni, døtrunum og familjuni.

Við hesum fáu orðum lýsa vit frið yvir minnið um Bjørg Matras.

**Føroya Skúlabókagrunnur**
**Nevnd og starvsfólk**


*Bergur Hansen, djóralækni*


*Heri Joensen, prestur*


*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*


*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*


*Jens Andreassen, lækni*


*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*


*Jón Klein Olsen, politistur*


*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*


*Julianna Næs, pedagogur*


*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*


*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*


*Marius Staksberg, málfrøðingur*

# Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn,

Fax 314720 ella teldupost: spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



